General Motors:

# Sølumet í Evropa




*General Motors settu sølumet í Evropa við yvir tveimum milliónum bilum í 2006*

**General Motors settu sølumet í Evropa í 2006 við yvir tveimum milliónum bilum. Eisini á russiska marknaðinum vaks sølan nógv**

SØLUMET

Í 2006 seldu General Motors Europe fyri fyrstu ferð nakrantíð meira enn tvær milliónir persón- og vørubilar i Evropa. Sølumetið er upp á 2.002.704 bilar. Hetta er ein vøkstur upp á 18.743 bilar og umleið eitt prosent meira enn í 2005.

Marknaðarparturin hjá GM í øllum Evropa var tilsamans 9.2 prosent.

Á tí skjótt vaksandi russiska marknaðinum vaks parturin hjá GM við 73 prosentum.

VW Golf GTI:

# Ársins bilur í USA og mest seldi í Evropa




*VW Golf GTI er kosin ársins bilur í USA og varð mest selda bilmodell í Evropa í 2006*

Amerikanska bilblaðið ”Automobile Magazine” hevur kosið VW Golf GTI til ársins bil í USA.

Bilurin hevur gjørt stórt árin á redaktiónina á blaðnum og lesararnar við sínum 200 hk motori og góðu koyrieginleikum saman við komforti á sera høgum støði.

Golf GTI koyrir frá 0-100 km/t upp á 7,2 sekund, og toppferðin er 235 km/t.

Í Evropa varð VW Golf aftur mest selda bilmodell í 2006 við 443.000 seldum bilum, framman fyri Renault Clio og Ford Focus.

Týski bilfelagsskapurin ”VDA” upplýsir at tíggju tey mest seldu bilmodellini í Vesturevropa í 2006, vóru evropeisk.

Sambært ”VDA” øktu tey týsku bilmodellini sín marknaðarpart frá 45,5 til meira enn 46 prosent í 2006 hóast hørðu kappingina frá Japan og Korea.

HD XR 1200™ Prototype:

# Nýggj framkomin Harley

*XR 1200 Prototype sigst vera tann besta súkklan Harley-Davidson nakrantíð hava gjørt*




**Harley-Davidson frumsýndu ein nýggja motorsúkklu á framsýningini “Intermot Motorcycle Show” í Köln í Týsklandi.**

Talan er um Harley Davidson XR 1200™ Prototype. Súkklan varð sýnd fram sum ein prototypa á størstu motorsúkkluframsýningini í Evropa fyri at fáa reaktión frá so nógvum fólki sum møguligt. Hon varð eisini sýnd fram fyri tíðindafólki.

XR 1200™ Prototype er um ein framkomin og sera sportlig súkkla, sum serliga er ætlað at tekkjast evropeisku kundunum. Hon hevur luftkøldan 1200 cc “V-Twin” motor við millum 85 og 90 hk. Dekkstøddin verður: 120/70ZR18 (framman) og 180/55ZR17 (aftan) Nýggjastu og mest framkomnu Nissin® bremsuskipanina.

XR 1200 Prototype sigst vera tann besta súkklan Harley-Davidson nakrantíð hava gjørt.

XR 1200 Prototype skal eisini venda sær til nýggjar kundar, eins og

XR 1200 Prototype er gjørd við Harley-Davidson XR 750 sum kom á marknaðin í 1970 sum fyrimynd. Hendan súkklan hevur verið ein “succes” hjá HD og hevur vunnið nógvar kappkoyringar.

Eftir ætlan skal framleiðslan av XR 1200 byrja í ár.




